Filmur

## Kroystur millum tvær kvinnur

# – Norbit fatalt BMI.

**Ummæli**



**Kim Simonsen**
kimsimonsen@hotmail.com



Norbit er ein lítil visaligur drongur, sum eingin er áhugaður í, tá fólk koma at finna sær eitt barn á barnaheiminum. Hann er ein einari og verður illa happaður av hinum børnunum. Ein dag kemur hann undir veingjabreiði hjá tí prúðu og sterku Rasputia. Frá hesum degi eru tey altíð saman. Tey síggjast í skúlanum og ganga í studentaskúla saman. Seinni gerðast tey eitt par og skulu giftast. Hann fær arbeiði hjá beiggjunum hjá henni, ið allir eru gangstarar, sum øll ræðast.

Norbit er eisini ein svakliga vánaligur og smakleysur filmur. Hendan tjúkka svarta kvinnan verður spæld av Eddie Murphy, sum hevur tríggjar leiklutir í filminum. Bæði sum Mr. Wong og sum Norbit. Hann er eisini produsari á filminum og hevur verið við til at skriva leikritið.

Murphy elskar at spæla spikafeitir professarar ella sum í Big Mamas House, ein tjúkk svørt rópandi kvinna. Var Murphy ikki svartur sjálvur, so vildu slíkir filmar verið ringasta slag av rasismu.

Eddie Murphy er fullkominliga skammleyst vánaligur í slíkum filmum, men man er noyddur at flenna onkuntíð. Uppá nógvar mátar er hetta ein drápsroynd á allar kærleikskomediur sum eru gjørdar.

Tað er sum um hann vil hevna seg inná allar kvinnur í heiminum við hesum filminum. Hendan Rasputia er so sanneliga ikki nakað offur fyri sínum fiti og lívshættesliga BMI (Body Mass Indeks) og liggur ikki undur fyri valurleikaidealum í USA. Men at enda so (yvir) spælir Murphy so svakt, at tað er sinnsvakt pínligt og ja skeg í kanska fimm minuttir.

Hesin filmurin kann ósmæðin kappast við Litle Man, Snakes on a Plane um heiti sum ringasti filmurin gjørdur. Hesin fer helst at vinna eina virðisløn í kategoriini ringasti filmurin gjørdur í 2007, men hann hevur innspælt 90 milliónir dollarar í USA, tað er ikki einki. Tey sum dyrka alt sum Murphy ger og sigur, fara at hugna sær her, men eg var nærri pinsluni.

### Fakta um Norbit

**Leikandi:**

| | |
|---|---|
| Norbit | Eddie Murphy |
| Rasputia | Eddie Murphy |
| Mr. Wong | Eddie Murphy |
| Kate | Thandie Newton |
| Deion Hughes | Cuba Gooding, Jr. |

**Leikstjóri:** Brian Robbins. Framførdur í Havnar Bio frá fríggjadegnum 16. mars. Aldursmark 7 ár. 102 minuttir.

# Brideshead Reviseted




Ein av heimsins bestu sjónvarpsrøðum er kanska hendan tragiska søgan um romantiskan longsul og tap. Brideshead Reviseted er ein filmatisering av bókini hjá snobbuta Evelyn Waugh, ið kom frá bohemabólkinum og rithøvundafelagskapinum The Oxford Wits. Søgan um Charles Rider og vinin Lord Sebastian Flyte í Oxford, er ein vøkur kærleikasøga um eina mista tíð. Vit síggja gjøgnum familjuna Marchmain fallið hjá enska heimsveldinum og hvussu trúgvin avskeplar og at enda broytir øll. Jeremy Irons spælir her sín besta leiklut nakrantíð. Vit síggja eisini stórar leikarar sum Sir John Gielgud og Laurence Olivier. Hetta er stóra røðin, ið gevir ein hug til at opna eina fløsku av Château Lafite (1899, sjálvandi) og fara á eina ferð aftur til ungdómsins eksentrisku og mistu dreymar, áðrenn disillusiónir vunnu. Røðin finst á 3 DVD-fløgum og er 660 minuttir. Kostnaður uml. 500 kr. 198 kr. í Onglandi.

**Heimatrøðin** finst nú øll á DVD. Heimat snýr seg um eina vanliga familju í hesum økinum frá 1917 til 1962. Hendan røðin, ið er gjørd av Edgar Rietz er ótrúlig. Hetta




er søgan um familjurnar Simon og Wiegand, ið komu úr hugsaðu bygdini Schabach í Hunsrüch. Røðin er í 11 pørtum og varð gjørd í áttatiárunum. Nøkur ár seinni kom so »Die Zweite Heimat« (Onnur heimbygdin), sum var í trettan pørtum og í 2004 kom so Heimat III. Vit møta einum bygdarfelagsskapi, ið er merkt av eindar- og almúgumentan. Røðin snýr seg um týska fólkið og ikki bert um ljóshærdar cliché-SS-yvirmenn við rundum brillum- Her eru vit á einari langari vitjan í Schabach. Vit síggja við eygum bygdarfólksins. Vit læra nasistar at kenna, fantastar, hjartasorgir og niðurdotnar borgir. Ivandi vitni til týska søgu í 20. øld, sædd úr einari smábygd. Í byrjanini av hvørjum parti sigur hann frá søguni hjá hvørjum einstakum, frá teim ið rýmdu, doyðu og teim, ið full í krínum. Hetta er stór filmlist. 6 DVD-fløgur, 924 minuttir. Kostnaður uml. 500 kr.

**6 stjørnur av 6**

**The Night We Call it a Day** er ein góð komedia við m.a. Dennis Hopper sum Frank Sinatra og Melanie Griffith sum elskarinnan hjá honum.



Søgan gongur fyri seg í 1974 í Australia, har tónleikafyriskipairn Rod fær Frank Sinatra at koma og syngja, men alt gongur púra galið. Frank er fullur og fornermar alt landið. Filmurin er vælgjørdur og DVD-útgávan er eisini nøkunlunda, hetta er tó einki meistaraverk.

**4 stjørnur av 6**